# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Marita Debess Magnussen:

## Prógv sum mikrobiologur



Marita Debess Magnussen hevur tann 7. september 2005 fingið prógv sum mikrobiologur við London School of Hygiene & Tropical Medicine.

Framman undan hevur hon bachelorútbúgving í biologi á Fróðskaparsetri Føroya.




MYNDIR AV NÝFØDDUM BØRNUM

Hvønn leygardag ynskir Sosialurin foreldrum tillukku við nýfødda barninum við at bjóða teimum at seta mynd av barninum í blaðið.

Foreldur kunnu senda mynd og tekst til teldupost: **post@sosialurin.fo** ella í brævbjálva til: **Sosialurin, box 76 FR-100 Tórshavn merktur "Nýfødda barn"**

Skriva avsendara, navn og adressu, og vit senda myndina aftur sum skjótast.

Tað er ókeypis hjá foreldrum at fáa mynd og tekst í hendan teigin.

Um foreldur ynskja tað, kemur myndafólk á føðideildina at taka mynd.

Sosialurin

**Ringið tel 341800**


# Fløga við Ólavi á Váli

**Í sambandi við at Ólavur á Váli, sangari og listamaður, sum andaðist 19. februar í ár, hevði fylt 50 ár fríggjadagin 26. august, gav Evangeliska Røddin út tífløguna "Lívsins land" hendan dagin**



FLØGA

Ólavur á Váli varð føddur 26. august 1955, næstyngstur av teimum fýra børnunum hjá Onnu og Líggjasi á Váli. Familjan búði í Klaksvík til 1972, tá tey fluttu til Havnar.

Útgávudagin, 26. august, hevði Ólavur á Váli fylt 50 ár. Hann var brádliga heimkallaður til Harran í februar í ár.

Á Váli familjan hevði góðar gávur at syngja. Ólavur var listamaður, óførur at tekna, og hevði eisini eina so stak góða songrødd, sum bert heilt fáum unnist.

Hann sang nógv; einsamallur, saman við M.C. Restorff og Nicodemussangbólkinum, í sangkórum, í Dupultkvartettini í Ebenezer, saman við systkjunum Britu, Charlottu og Jóannesi, og saman við so mongum øðrum. Hann sang fyri einstaklingum og fyri stórum áhoyrarskarum. Hann sang runt í okkara egna landi, og hann sang í londunum rundan um okkum. Men hann sang ikki fyri at koma sær sjálvum fram. Nei, gripin av Skaparanum og frelsuverkinum sang hann.

Á nýggju fløguni, sum er tífløga og ber heitið "Lívsins land" eru tilsamans 41 sangir, sum Ólavur syngur einsamallur ella saman við øðrum, - eitt nú Nicodemussangbólinum, Dupultkvartettini og á Váli familjuni. 14 av hesum sangum hava ikki verið útgivnir áður.

Nýggja tífløgan, sum Evangeliska Røddin gevur út, er at fáa í handlunum og kostar kr. 189,-. Síðan fløgan kom út, hevur hon verið sera væl móttikin.

# Christmas Child kvøld Hoyvíkar Skúla



*Ian Macleod frá hjálparfelagsskapinum Samaritain`s Purse (h.m.) saman við umboðum fyri felagsskapin í Føroyum, f.v.: Unn Zachariassen, Beinta Áargarð og Durita Djurholm. Hanna Andreasen vantar á myndini*

*Mynd: Tórvør Vang±*

**Í sambandi við at ein av leiðarunum hjá kristna hjálparfelagsskapinum Samaritan`s Purse, Ian Macleod, vitjaði í Føroyum, var kunnandi fundur um skógvaeskjutiltakið Christmas Child týskvøldið 13. september í Hoyvíkar skúla**

HJÁLPARTILTAK

Týskvøldið 13. september vóru fólk frá ymiskum samkomum kring landið savnaði til kunnandi fund í Hoyvíkar skúla um skógvaeskjutiltakið Christmas Child, sum samkoman Lívdin í Hoyvík skipar fyri triðja árið á rað.

Christmas Child er eitt tiltak undir Samaritan's Purse, sum seinastu 25 árini hevur glett meiri enn 38 milliónir børn við at geva teimum eina skógvaeskju við gávum. Franklin Graham, sonur navnframa Billy Graham, stjórnar vælgerandi felagsskapinum Samaritan's Purse, har eitt av tiltøkunum er Operation Christmas Child.

Christmas Child er heimsins størsta jólatiltak fyri børn. Í fjør vórðu yvir 7,4 milliónir skógvaeskjur latnar líðandi børnum í 95 londum.

Eina av leiðarunum í Samaritan's Purse, Ian Macleod úr Chesterfield í Onglandi, var komin til Føroya at greiða frá arbeiðinum hjá felagsskapinum, og um hvussu arbeiðið við Christmas Child gongur fyri seg. Skógvaeskjurnar úr Føroyum verða sendar til Glasgow í Skotlandi, har tær verða umskipaðar og síðan koyrdar víðari í stórum bilum til eitt nú lond í Eysturevropa.

Við at geva eina skógvaeskju við gávum, kunnu vit í Føroyum broyta jólini hjá einum barni á t.d. barnaheimi, flóttalegu, sjúkrahúsi ella á gøtuni. Fyri fleiri at hesum verður henda jólagávan einasta gávan barnið fær.

Tað eru fyri tað mesta samkomur, kirkjur og skúlar í ymiskum londum sum senda skógvaerkjur. Tiltakið hevur fingið sera góða undirtøku í Føroyum. Í fjør vóru yvir 1.700 erkjur sendar av landinum, og málið í ár er 3.000. Freistin at lata skógvaeskjur inn er sett til 30. oktober. Áhugað kunnu venda sær til tel. 312655 ella mail adr: aargard@kallnet.fo




HJÁLP TIL AT FESTA HUGSAN Á BLAÐ

Føðingardagar · Starvsdagar · Minningarorð

**Fært tú ikki tikið teg saman?**

Hugsar tú um at seta eina heilsan í blaðið í sambandi við onkran merkisdag í familjuni ella hjá arbeiðsfeløgum. Her verður eitt nú hugsað um rundar dagar, føðingardagar, gullbrúdleyp, starvssetanir, jubileum á arbeiðsplássinum o.s.v.

Set teg í samband við okkum. Um vit fáa nøkur stikkorð, so kunna vit í felag skriva greinina, sum verður meira áhugaverd at lesa, tá ið tit senda okkum eina mynd við. Tað sama kann gerast í samband við minningarorð.

Sosialurin

"Nøvn í vikuni"
Tel.341800 / 216135
Teldupost: maggi@sosialurin.fo